RFF upplýsir 9. flokkar um ferðsluvandar og ungdóm:

# – Ætlaði at gerast skipsførari, men gjørdist førari á einum koyristóli…

**Soleiðis greiðir sandavágingurin, Jákup Thomassen, frá. Hann luttekur í undirvísingini, sum í januar og februar fer fram á Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Saman við løgregluni, ambulansutænastuni og koyrilærarum, ger RFF nógv burtur úr at kunna ungdómin um ferðslu og ferðsluvandar, nú hesi um eini 2-3 ár sjálvi fáa koyrikort**

FERÐSLUKUNNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Undirvísingin byrjaði, 19. januar, tá ið ungdómar úr Nólsoyar skúla og Eysturskúlanum í Havn vitjaðu á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

- At 9. flokkur er valdur sum málbólkur fyri undirvísingini, kemst av, at hetta er seinasta høvið at hitta ein heilan árgang á máli í senn í fólkaskúlanum. Longu í 10. flokki byrja næmingarnir so smátt at fara í hvør sína ætt. Haraftrat kemur, at næmingar í 9. flokki kunnu taka koyrikortið um eini 2-3 ár. Tí er er upplýsing um ferðsluvandar millum ung sera viðkomandi fyri júst henda aldursbólk.

Ráðið fyri Ferðslutrygd, sum ger nógv burtur úr hesum tiltaki, sigur, at skeiðini fevna um allar næmingar, sum eru føddir í 1988.

### At skilja…

– Endamálið við skeiðunum er at fáa næmingin at skilja, hvussu nær vandanum hann í veruleikanum er – og at tað ikki bara eru "hini", sum kunnu koma álvarsliga til skaða í ferðsluni.

Við frágreiðingum, filmum og myndum verður roynt at lýsa, hvussu gangast kann, tá ið ringast vil til.

– Á skeiðunum royna vit at seta avleiðingarnar av ferðsluvanlukkum í brennidepilin, nevniliga tað dýrabara og óskadda í mun til tað brotna og syndraða – ella: Hitt ljósa og vónríka unga sinnið í mun til tað døkka og vónbrotna.

Ráðið fyri Ferðslutrygd sigur, at endamálið er at geva næmingunum eina sterka uppliving, sum setir seg í mergin.

– Á henda hátt vóna vit at kunna ávirka hugburðin hjá ungdóminum hin "rætta" vegin.

Seinastur av skúlaflokkunum í røðini at verða kunnaðir um ferðsluvandarnar, eru næmingarnir á Felagsskúlanum á Oyrarbakka, sum møta, 24. februar.

Undirvísingin fer fram í hølunum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd Yviri við Strond í Havn, og RFF skipar fyri og rindar flutningin hjá næmingunum, fram og aftur.

### Ein lagna…

Ein vanligur skeiðdagur á RFF byrjar klokkan 9.30 og er liðugur góðar 5 tímar seinni.

Í hesum tíðarbili greiða eitt nú RFF, koyrilærarar og ambulansutænastan frá ferðslu og ferðsluvandum.

Sandavágingurin, Jákup Thomassen, sum í 1988 varð raktur av syndarligari ferðsluvanlukku í Miðvági, greiðir frá, hvussu hansara vónir at gerast skipsførarar brustu.

– Eg var sjómaður, og ætlaði mær at gerast skipsførari, men eg gjørdist í staðin koyristólsførari.

Ein hjartamemandi frágreiðing um bjartar vónir hjá einum 18 ára gomlum, sum síðan vanlukkuna hevur sitið í koyristóli.

Evnið, sum Jákup tosar um, er rúsdrekka og ferðsla.

Allir næmingarnir, sum eru á skeiði hjá RFF, fáa ein faldara heim við sær við mynd av flokkinum á forsíðuni.



*Jákup Thomassen varð raktur av syndarligari ferðsluvanlukku í Miðvági 1988 og gjørdist avlamin. – Eg ætlaði mær at gerast skipsførari, men gjørdist í staðin førari á einum koyristóli*

9.a í Runavíkar kommunuskúla luttók hósdagin, 29. januar, á hesum skeiði og komu tey glað og ríkari heimaftur.

Í faldaranum er eisini eitt spurnarblað, sum fevnir um 10 spurningar til foreldrini. Eitt nú verður spurt: Heldur tú, at tú hevur verið ein góð fyrimynd í ferðsluni fyri børn tíni. Ein annar áhugaverdur spurningur snýr seg um prutl: Er tað í lagi at geva teimum ungu skutara ella prutl, áðrenn tey eru 16 ár?

– Tá ið næmingarnir hava fingið foreldrini at svara hesum spurningum, hava ungdómar og foreldur ivaleyst verið ígjøgnum eitt áhugavert prát – og tá er okkara mál í veruleikanum rokkið.

Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir tó næmingunum til at senda svarini til stovnin – og gera teir tað, eru teir samstundis við í einum lutakasti um at vinna fimm gávukort frá SMS, sum hvørt er vert 1000 krónur.



*9.a í Runavíkar kommunuskúla er ein av skúlaflokkunum, sum hevur luttikið á skeiði á Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Aftast f.v.: Beinir Danielsen, Bárður H. Thomsen, Jákup Andreassen, Jan B. Anthoniussen, Brian Jacobsen og Magni S. Davidsen. Næstaftast f.v.: Monika W. Poulsen, Hans Petur Hansen, Jón Hansen, Kristian í Lon, Joan Simonsen og Jenny á Reynatrøð. Næstfremst v.v.: Jenny Troest, Birita Sørensen, Súsanna Thomassen, Jógvan Juul Olsen, Heri Olsen, Bogi A. Løkin og Karla Maria Gaardbo. Fremst f.v.: Rebekka O. Berg, Hjørleif Sevdal, Helena Johannesen og Dania Jensen. Myndina hevur Jón Kragesten, dagligur leiðari á RFF, tikið*



# Tingnevndirnar hava skipað seg

**Allir løgtingsnevndirnar vórðu mannaðar hósdagin. Sessirnir í Norðurlandaráðnum eru kortini ikki mannaðir enn. Tjóðveldisflokkurin ynskir at halda fast við siðvenjuni um, at samgongan og andstøðan hava hvør sítt umboð í Norðurlandaráðnum**

TINGNEVNDIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Nú Anfinn Kallsberg ikki slapp í landsstýrið, er hann aftur vanligur tingmaður hjá Fólkaflokkinum. Komandi tingskeið skal hann verða formaður í løgtingsins fíggjarnevnd*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á tingfundi hósdagin vórðu allar tingnevndirnar mannaðar uttan føroysku umboðini fyri Norðurlandaráðið. Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin bóðu formansskapin útseta valið av umboðum til Norðurlandaráðið.

Sjálvstýrisflokkurin er blivin partur av tingbólkinum hjá samgonguni og tí kann samgongan við 22 tinglimum ímóti 10 andstøðutinglimum fáa báðar sessirnar í Norðurlandaráðnum, um hon ynskir tað Eftir ætlan skuldu Óli Breckmann og Kári P. Højgaard fáa sessirnar í Norðurlandaráðnum, men eftir umbøn frá andstøðuni varð valið útsett.

Siðvenjan hevur verið, at andstøða og samgonga hava átt hvør sítt umboð í Norðurlandaráðnum.

Á komandi tingfundi mikudagin skulu umboðini fyri Norðurlandaráðið endaliga finnast og stóri spurningurin verður um tingbólkurin hjá samgonguni vil lata andstøðuni annan sessin í Norðurlandaráðnum.

Tingnevndirnar eru mannaðar soleiðis:

**Fíggjarnevndin**
Anfinn Kallsberg, formaður
Vilhelm Johannesen, næstformaður
Lisbeth L. Petersen
Kaj Leo Johannesen
Kári P. Højgaard
Páll á Reynatúgvu
Karsten Hansen

**Landsstýrismálanevndin**
Kári P. Højgaard, formaður
Kjartan Joensen, næstformaður
Karsten Hansen

**Mentanarnevndin**
Andrias Petersen, formaður
Jákup Mikkelsen, næstformaður
Marjus Dam
John Johannessen
Olav Enomoto
Heidi Petersen
Tórbjørn Jacobsen

**Rættarnevndin**
Alfred Olsen, formaður
Kristian Magnussen, næstformaður
Poul Michelsen
Sverre Midjord
Marjus Dam
Finnur Helmsdal
Bill Justinussen

**Trivnaðarnevndin**
Jørgen Niclasen, formaður
Finnur Helmsdal, næstformaður
Andrias Petersen
Lisbeth L. Petersen
Jaspur Vang
Annita á Fríðriksmørk
Bill Justinussen

**Uttanlandsnevndin**
Kaj Leo Johannesen, formaður
Óli Breckmann, næstformaður
Anfinn Kallsberg
John Johannessen
Kristian Magnussen
Hergeir Nielsen
Jenis av Rana

**Vinnunevndin**
Henrik Old, formaður
Alfred Olsen, næstformaður
Jørgen Niclasen
Heðin Zachariasen
Gerhard Lognberg
Tórbjørn Jacobsen
Heidi Petersen

**Útnorður ráðið**
Henrik Old, formaður
Alfred Olsen
Poul Michelsen
Kári P. Højgaard
Høgni Hoydal
Jenis av Rana

# Býráðið mátti bakka

**Umstríddu reglarnar fyri starvsfólkið hjá Tórshavnar Býráð, eru settar úr gildið aftur fyribils, eftir at 11 fakfeløg góvu býráðnum knívin á barkan**

STARVSFÓLKA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tórshavnar Býráð hevur nú slakað og starvsfólkið í býráðnum sleppur nú aftur til lækna og at fylgja líkið, uttan at verða drigin í løn.

Men nú skal støðan kannast nærri og so venda tey aftur til málið.

Tað var úrslitið av einum fundi, sum 11 fakfeløg høvdu við býráðið seinnapartin hósdagin.

Fakfeløgini høvdu sett býráðnum knívin á barkan eftir at býráðið av sínum eintingum hevur sett reglar í gildi fyri privatum ørindum hjá starvsfólki í arbeiðstíðini.

Tær reglarnar søgdu, at hereftir skulu starvsfólk ikki kunna fara til lækna, ella tannlækna í arbeiðstíðini, uttan at verða drigin í løn.

Samstundis sleppa tey bara at fylgja sínum allarnærmastu til gravar, uttan at verða drigin í løn.

### Brot á sáttmálan

Hetta fekk ilt í fakfeløgini. Tey hava einki ímóti, at greiðar reglar eru fyri starvsfólkið hjá býráðnum.

Men tey siga, at tað er brot á sáttmálan og á avtalur at býráðið av sínum eintingum setir reglar í gildi, uttan at samráðast við Starvsfólkið.

– Vit viðurkenna tí rættin hjá Tórshavnar kommunu innan fyri hesar karmar og innan fyri vanliga rímiligheit at gera regluferð fyri, hvussu privat ørindi hjá starvfólkinum skulu avgreiðast í arbeiðstíðini, siga fakfeløgini.

Hinvegin vísa tey á, at í mong ár eru starvsfólkini ikki drigin í løn, tá tey hava verið til jarðarferð, hjá lækna, tannlækna og líknandi ørindi í arbeiðstíðini.

– Hesi viðurskifti eru tískil ein partur av galdandi sáttmálagrundarlagi, bæði millum Tórshavnar kommunu og tað einstaka starvsfólkið og millum kommununa og undirritaðu verkafeløg, sum stilltigandi og útfyllandi partur av sáttmálunum.

Og tey 11 feløgini, sum talan er um, eru: Starvsmannafelagið, Føroya Pedagogfelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Føroya Byggifrøðingafelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Verkfrøðingafelag, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Magistarafelag Føroya, Havnar Handverkarafelag og Føroya Lærarafelag.

### Býráðið slakaði

Fundurin var seinnapartin hósdagin og úrslitið av tí fundinum var, at býráðið mástti taka reglarnar aftur.

Fyri fyrst í hvussu so er.

Sostatt sleppur starvsfólkið aftur at fylgja og at fara til lækna, uttan at missa løn.

Reglarnar eru tiknar aftur í eina viku. Og hendan vikan skal brúkast til at fáa staðfest, um talan er um brot á sáttmálan og um talan er um brot á galdandi siðvenju, sum býráðið ikki kann broyta.

Partarnir skulu so hittast aftur 16. februar.

Carita Bjørklund, forkvinna í pedagogfelagnum, sum er ein fakbólkur við nógvum fólki í starvi hjá býráðnum, er væl nøgd við fundin.

Hon ivast ikki í, at niðurstøðan verður, at talan er um sáttmálabrot og brot á galdandi siðvenju, sum Tórshavnar Býráð ikki kann setast í gildið av sínum eintingum.

Tí ivast hon heldur ikki í, at reglarnarverða ikki settar í gildi aftur. Og hon ivast heldur ikki í, at verða nýggjar reglar settar í gildi fyri starvsfólki, verður tað ikki gjørt, uttan at tað verður í samráð við starvsfólkið.